VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinnapartin hækkar hann upp í útnyrðing og um kvøldið veksur hann vindin upp í hvassan vind. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið hósdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið lækkar hann niður í útsynning og veksur vindin upp í hvassan vind og møguliga regn. Hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og ælingur, sunnumorgunin minni vindur, men um dagin snarar hann í eystan og veksur vindin aftur upp í hvassan vind og regn. Hitin millum 8 og 12 stig,

Endiliga dugir Trølla Omman at telja upp í 10!

TRØLLAPATUR
Tíðindaskriv

Í samband við at Trølla Pætur og Trølla Omman geva út nýggja bók, fara tey um vikuskiftið at vitja fýra Shellstøðir, har børnini kunnu fáa autografar á hesar bøkur. Eisini hava tey stóra Trølla-Bussin við, og kunnu øll børn hyggja inn í hann.

Fríggjadagin kemur nýggj barnabólk út á marknaðin, og er hetta fyrsta bólkin sum Trølla Pætur og Trølla Omman geva út. Bólkin eitur: "Trølla Omman lærir at telja uppí 10", og er hon væl hóskandi til børn undir skúlaaldur.

Í bókini lærir Trølla Pætur ommuna at telja uppí 10, upp á ein fittan og stuttligan máta. Í samband við hesa útgávu, so verður nógv gjørt burturúr, tí um vikuskiftið fara trøllini at vitja fýra Shellstøðir, har høvi verður hjá børnum at heilsa upp á trøllini og fáa autografar.

Leygardagin klokan 14 vitja tey Shellstøðina í Klaksvík og sama dag kl. 17.00, leggja tey leiðina fram við Shellstøðini í Gøtudali.

Sunnudagin klokkan 14 ber til at heilsa upp á trøllini á Shellstøðini við Ringvegin í Havn og sama dag klokkan 17 vitja trøllini Shellstøðina á Frælsinum.

Í samband við hetta tiltakið er Trølla Omman í serliga góðum lag, tí hon ætlar sær at bjóða øllum børnunum ókeypis Pop-Top, sum hon hevur fingið frá MBM.

Nýggja bókin hjá trøllunum kostar 59 krónur, og fæst á omanfyri nevndu Shellstøðum og hjá BR-leikum.

Í samband við at Trølla Omman nú dugir at telja upp í 10, so hava trøllini eisini gjørt ein nýggjan sang um at telja upp í 10. Hesum sangi kunnu børn lurta eftir á heimasíðuni hjá trøllinum – www.tp.fo

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-1
Nuuk	2
Qaqortoq	6
Ammassalik	1
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	2
Seyðisfjørður	0
Tórshavn	6
Lerwick	11
Aberdeen	10
London	12
Tromsø	--
Bergen	11
Oslo	--
Stokkhólm	11
Keypmannah.	12
Helsinki	11
Moskva	17
Berlin	12
Warzawa	16
Kiev	16
Bukarest	19
Paris	--
Madrid	--
Róm	22
Malorca	24
Athen	26
Malta	23
Tunis	24
Beijing	22
New Dehli	33
Bangkok	26
Jakarta	33
Sydney	35
New York	16
Miami	27
Los Angeles	23
Meksikobýur	22
Panama	29
La Paz	18
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	23

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 988 hPa. eystan fyri Hvarvið kemur hendavegin og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.



Í dag:
Lágtrýstið við Ísland fer spakuliga eystureftir og gevur sum frálíður útnyrðing á okkara leiðum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 11/10 kl. 06^{00} – 12/10 06^{00}. Hitin í gjár: 9,8°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 9,0 mm – mált frá 11/10 kl. 06^{00} – 12/10 06^{00}.
Avfallið higartil í oktober: 130 mm

Lesið Sosialin

VESTFALLSKYRRINDI

14. oktober Fullmáni
17. oktober Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
14. okt	6:30	18:52	5:30	17:52	5:45	18:07	8:30	20:52	9:30	21:52	4:45	17:07	3:45	16:07	6:45	19:07	7:45	20:07	6:15	18:37	7:30	19:52
15. okt	7:15	19:39	6:15	18:39	6:30	18:54	9:15	21:39	10:15	22:39	5:30	17:54	4:30	16:54	7:30	19:54	8:30	20:54	7:00	19:24	8:15	20:39
16. okt	8:03	20:29	7:03	19:29	7:18	19:44	10:03	22:29	11:03	23:29	6:18	18:44	5:18	17:44	8:18	20:44	9:18	21:44	7:48	20:14	9:03	21:29
17. okt	8:56	21:26	7:56	20:26	8:11	20:41	10:56	23:26	11:56	-	7:11	19:41	6:11	18:41	9:11	21:41	10:11	22:41	8:41	21:11	9:56	22:26
18. okt	9:56	22:26	8:56	21:26	9:11	21:41	11:56	-	0:26	12:56	8:11	20:41	7:11	19:41	10:11	22:41	11:11	23:41	9:41	22:11	10:56	23:26